
Karl býr ovarlaga í bygdini og hevur gott útsýni yvir bygdina – og ikki minst Gásadalstunnilin

# 1700 metrar til umheimin

**Fyrr mátti Karl Mikkelsen ganga tríggjar ferðir um vikuna upp um fjallið eftir postinum. Nú hevur Gásadalstunnilin gjørt lívið léttari hjá honum. Samstundis minkaði arbeiðsdagur hansara**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Gásadalur:** – Ja, teir frá Sosialinum eru her. Hmm, til Kollfjarðardal?! Eg skal spyrja. Bíða við!

Vit eru staddir inni í einum av húsunum í Gásadali – hjá tí 61 ára gamla Karl Mikkelsen, postmanni og bónda í bygdini.

Ein góður kaffimunnur stendur á borðinum og kaka afturvið. Telefonin ringir.

Tað er ein kona úr Havn í hinum endanum. Henda kvinnan hevur verið og vitjað systur sína í Gásadali í nakrar dagar og ætlar sær nú heimaftur.

Bilurin hjá Sosialinum – SNAR– er lítil, men hann skínur kortini upp í landslagnum her í Gásadali. Hon var eisini vitandi um hesa vitjanina.

Nú ynskir hon at fáa fart aftur móti Havnini, har maðurin skal møta henni í Kollfjarðardali. Fyri okkum í tíðindatænastuni er hetta bara ein eyka uppliving til ta longu og forvitnisligu ferðina, sum byrjar henda góðveðursmorgunin í næstvestastu bygd okkara.

Var koyrandi longur vestur, høvdu vit verið í Mykinesi. Ætlan okkara er at bjóða Karli ein túr eftir teirri gomlu farleiðini til Viðareiðis og síðani koyra hann allan vegin aftur til heimbygdina eftir landsvegnum.

– Jú, teir siga at tað er í fínasta lagi. Vit eru klárir at fara um fimm minuttir, svarar Karl henni á sínum eyðkenda vágamáli.

Løtu seinni eru vit klárir at leggja til brots.

### 1700 metrar

Tað er liðið nakað út á morgunin. Sólin roðar á teir fimm tindarnar á Tindhólmi, tá bilurin verður settur í gongd og kósin verður sett móti norðastu bygd okkara.

Vit steðga á við fyrstu húsini í bygdini, har áðurnevndu systrar búgva. Løtu seinni er bilurin fullmannaður, og niðan brekkuna ber nú leiðin eftir tí 1700 metrar langa vegnum, sum á sinni gav navn til forvitnisliga filmin um Gásadal.

Tey bæði kennast, og skjótt fellur prátið inn á ymisk viðurskifti í bygdini – vegasamband, landbúnað og ikki minst spennandi upplivingarnar, sum standa Karli fyri framman.

Tað er ikki á hvørjum degi at ein soleiðis verður borin á lógvum av tíðindatænastuni. Og at ein sum tann fyrsti nakrantíð fær møguleikan at koyra allan vegin til norðastu


Seyður og neyt hava hansara størsta áhuga. Karl ansar og eigur tilsaman 28 kriatúr